

*Øll eru vælkomin til tiltakið, sum tónleikalærarar í Suðuroynni hava tikið stig til.*

# Tónleikur á breddan í Suðuroynni

**Leygardagin verður stórt tiltak í Hvalba, har tónleikurin verður settur á breddan. Fyrilestrahaldarar siga sína hugsan um tónleik í oynni fyrr og nú og framyvir og livandi tónleikur verður at hoyra. Millum røðararnar verður løgmaður**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Suðuroyggin og tónleikurin. Fyrr, nú og í framtíðini. Soleiðis ljóðar yvirskriftin fyri tiltak, sum verður í skúlanum í Hvalba leygardagin frá klokkan 13 til 17.

Tónleikalærarar, næmingar og tónleikarar fara at spæla millum smáu fyrilestrarnar, sum eru á skránni. Fleiri røðarar fara at siga sína hugsan um tónleik og umboða teir ymsar bólkar í samfelagnum. Sum njótarar og/ella nýtarar av tónleiki.

Elin Nielsen bjóðar vælkomin og Einar Larsen sigur so eitt sindur um tónleikasøguna í Suðuroynni. Vegna kommunurnar sigur Anna Djurhuus nøkur orð, vegna vinnulív Anna Kirstin Thomsen, vegna peningastovnar Mikkjal Sørensen, vegna ítrótt Heri Mortensen, vegna skúla Nita Næs og síðsti røðarin er løgmaður Jóannes Eidesgaard. Høvi verður at seta fyrilestrahaldarum spurningar.

Fyrilestrarnir eru smáar 10 minuttir og ímillum spæla ymsir bólkar tónleik.

Øll eru vælkomin til tiltakið, sum tónleikalærarar í Suðuroynni hava tikið stig til.




# Brúkti barnavognurin telur við



*Baby & Barnaútgerð í Havn fer nú at lata pengar fyri gamla barnavognin, tá ein nýggjur verður keyptur*

**Sum fyrsti handil í Føroyum, fer Baby & Barnaútgerð í Havn, at gjalda fyri brúktar barnavognar , ið verða sendir vælgerandi endamáli**

BARNAVOGNAR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá fólk keypa sær nýggjan bil, er gamli bilurin ofta ein partur av handlinum, soleiðis at hann tá í ávísan mun er gjaldið fyri nýggja bilin.

Hetta er eitt konsept, sum kanska ikki er so vanligt, tá eitt nú baranvognar verða keyptir, men tað verður so broytt nú.

Baby & Barnaútgerð í Havn hevur nevnliga tikið táttin upp eftir bilhandlarunum, og framyvir verður tað so, at um fólk hava teirra gamla barnavogn við - og hesin framvegis er nýtiligur - tá nýggjur verður keyptur, so verður eitt ávíst gjald latið fyri gamla vongin.

Tað verður tó ikki sum hjá bilhandlarunum, at fólk so eisini kunnu velja, hvørt tey vilja nýta nógvan pening til ein nýggjan bil ella heldur eitt sindur minni til ein gamlan.

Handilin hevur nevnliga gjørt avtalu við føroyskan hjálparfelagsskap, soleiðis at gomlu barnavognarnir framvegis kunnu gera gagn, har materiallu ágóðarnir kanska ikki eru heilt so vanligir, sum teir eru hjá nógvum foreldrum í okkara egna vælferðarsamfelag.



# Heimsins største hospitalsskip vitjar í Føroyum

**Frá 7. til 15. juli í summar vitjar í Føroyum hospitalsskipið Anastasis, sum er eitt av trimum skipum í globala hjálparfelagsskapinum Mercy Ships, hvørs aðalendamál er at veita hjálp og vón í einum neyðstøddum heimi. Eftir drúgt arbeiði í Sierra Leone kemur skipið í summar til Europa at fyrireika næstu ferðina til triðja heimin, og leggur Anastasis leiðina framvið Føroyum**

HJÁLPARARBEIÐI
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*Suðurafrikanin Andre Cronje vinstrumegin er samskipari umborð á heimsins størsta hospitalskipi Anastasis, og Annika við Skipá, sum hevur verið umborð í Afrika í seks mánaðir, er umboðskvinna fyri felagsskapin í Føroyum*

Mercy Ships er ein vaksandi kristin hjálparfelagsskapur, sum við trimum hospitalsskipum veitir hjálp í neyðstøddum økjum, fyrst og fremst í triðja heiminum. Felagsskapurin hevur trý skip mannað við læknum, lærarum, landbúnaðarfólki, sjúkrarøktafrøðingum, verkfrøðingum og øðrum faklærdum fólki, sum sigla úr havn í havn í neyðstøddum økjum at veita alskyns hjálp til tilafturskomin fólk. Felagsskapurin Mercy Ships hevur verið virkin síðani 1978, og nú kemur eitt av teimum trimum skipunum, Anastasis, til Føroya at vitja í summar eftir drúgt arbeiði í Sierra Leone í Vesturafrika. Anastasis er heimsins største hospitalsskip við umleið 400 frívilligum arbeiðsfólkum umborð úr 35 ymsum tjóðum, og talan er tí av sonnum um eina multinationala manning, sum í summar vitjar í Norðuratlantshavi.

Felagsskapurin hevur fingið nógvar virðislønir fyri arbeiðið sítt kring allan heim, og hevur hetta eisini vakt uppmerksemi á politiska leikpallinum. Eitt nú hava fyrrverandi og núverandi forsetarnir í Onglandi og USA, Tony Blair, John Major og Jimmy Carter, allir alment veitt stuðul sín til Mercy Ships felagsskapin.

## Til Europa eftir útgerð

Hospitalsskipini hava nýmótans og framkomin laboratoriið og skurðdeildir umborð at grøða neyðstaddar sjúklingar í triðja heiminum, og gera skipini einaferð um árið neyðugar túrar til vesturheimin, haðani størsti peningaligi stuðulin kemur. Alt arbeiðið í felagsskapinum er frívilligt, og tí verður alt virksemið fíggjað gjøgnum gávur og stuðul. Um slíkt professionelt hjálpararbeiði skal fremjast í triðja heiminum, er neyðugt hvørt ár at útvega sær nýggja útgerð, proviant og ikki minst manning í Europa, sum als ikki eru at fáa í tilafturskomnum økjum, umframt at skipið fer á skipasmiðju í Týsklandi. Hetta er orsøkin til, at Anastasis kemur til Europa og leggur leiðina framvið Havnini frá 7. til 15. juli.

Suðurafrikanin Andre Cronje er samskipari umborð á Anastasis í sambandi við havnavitjanir, og er hann longu komin til Føroya at gera fyrstu fyrireikingarnar til vitjanina í summar.

– Vit vilja kunna vesturlendingar og føroyingar um skipið og arbeiðið okkara í triðja heiminum, og fáa øll høvi at koma umborð hesar dagarnar, sigur Andre Cronje, sum býr í Cape Town. Hann vísir á, felagsskapur teirra hevur umboð í øllum Norðurlondum, og í Føroyum er Annika við Skipá umboð fyri Mercy Ships.

– Tískil eru vit fegin um høvi at vitja her um leiðir, og vónandi verður vitjanin væleydnað, sigur Andre Cronje. Annika við Skipá greiðir frá, at fleiri føroyingar hava verið umborð á skipinum, og sjálv hevur hon við familju verið umborð í tilsamans seks mánaðir í Sierra Leone og Togo, har hon sum lærari undirvísti umborð.

Viðvíkjandi fígging sigur Andre Cronje, at skipið í størstan mun fær peningagávur úr Onglandi og USA, og eru útreiðslurnar til virksemið umborð á Anastasis nakrar milliónir dollarar um árið, har størsti parturin fer til útgerð.

## Gleðiboðskapurin ígjøgnum hjálp

Andre Cronje greiðir frá, at talan er um ein kristnan felagsskap, sum tó ikki er tengdur at ávísari trúargrein ella samkomu, meðan aðalendamálið fyrst og fremst er at hjálpa samfeløgum at koma á føtur, har praktiska hjálpin er ovast á raðfestingarlistanum.

– Ígjøgnum praktisku hjálpina boða vit gleðiboðskapin um vón, og úrslitini hava verið fantastisk, sigur Andre Cronje. Hann vísir t.d. á, at eftir trý ár í Sierra Leone hevur manningin á Anastasis fingið landbúnaðarvinnu í gongd, sjúkrahús, barnaheim, og hús eru bygd, undirvísing er komin í økini o.s.fr.

– Munurin í dag samanborið við, tá Anastasis á fyrsta sinni kom til Sierra Leone fyri trimum árum síðani, er heilt ótrúligur, sigur Andre Cronje úr Cape Town.

Í summar fáa føroyingar so høvi at vitja og stuðla virkseminum umborð á Anastasis, tá skipið liggur á Havnarvág í átta dagar, og eisini er høvi at fáa nærri kunning á heimasíðuni www.mercyships.org.



*Umborð á Anastasis eru nýmótans laboratoriið og skurðdeildir, og her verður afrikansk genta løgd undir skurð umborð á hospitalskipinum*



*Hospitalskipið Anastasis varð fingið til vega av hjálparfelagsskapinum Mercy Ships í 1978, og síðani tá hevur skipið siglt úr havn í havn í tilafturskomnum økjum at veita hjálp*